Janus Kamban
1913-2009

Janus Kamban avmyndaði gerandisdagin í Føroyum, djór, útróður, seyðamenn og neytakonur í dagliga arbeiði teirra. Eitt einfeldni og ein reinleiki - bæði hóvlig og bundin at einari stórari virðing fyri menniskjanum í gerandisdegnum - eyðkenna myndir hansara.

Maður við fiski, 1967
Standmyndin er statisk í bygnaði og vísir ein mann við fiskateyggjum í báðum hondum. Maðurin er væl bygdur, herðabreiður og lágbeintur og hevur stuttan háls, langan rygg og stórar hendur. Hann er nakað framboygdur, men er avgjørdur og miðvísur í uppgávuni. Hann er óivað vanur við kropsligt arbeiði, hendurnar og kroppurin bera boð um tað.

Standmyndin hjá Kamban hevur eina sosiala vídd, ið heldur sipar til ein starvsbólk enn til fiskimannin sum einstakling. Standmyndin er bæði tilfarsliga væl frágingin og umboðar í hugsan fiskimannin sum starvsbólk og lýsir í tí sambandi fiskimannin sum eina stóra og sterka hetju.

Janus Kamban, *Maður við fiski* 1967

♥ Finn myndina og set kross: ☐

♥ Hvat heldur maðurin í hondunum? fiskar ☐ ella bananir ☐

♠ Hevur maðurin í hondunum? greipu ☐ bunti ☐ ella teyggju ☐

♠ Úr hvørjum tilfari er standmyndin? gips ☐ ella betong ☐

♦ Hví heldur tú, at maðurin hevur so stórar hendur?

♦ Hvønn arbeiðsbólk umboðar maðurin?

♣ Hvønn týdning hevur tilfarið fyri, hvussu verkið ber seg fram?

♣ Lýs verkið stutt við tínum egnu orðum?

_____

_____

_____

_____